TB-KÍ 4-1 (1-0):

# Full ferð á TB

Triðja dystin upp í slag fekk TB fult, og hevur aldorsforsetin nú lagt seg einsamallan á odda í næstbestu mansdeildini.

Hesaferð var tað KÍ, sum vitjaði, og tað skerst ikki burtur, at tað kann kennast møtumikið, tá ferðast skal um tað mesta av landinum undan einum dysti.

Og í øllum førum tóktist teir á heimaliðnum betri upplagdir til dystin leygardagin, men teir máttu bíða til dygst undan steðginum, áðrenn teir fingu nakað burtur úr greiðu yvirvágini.

Í seinna hálvleiki gekk tó skjótari at koma á rætta lagið. Dan Mortensen skoraði mest sum alt fyri eitt, og tá Kaj Roest stutt eftir økti til 3-0, var leyst og liðugt hjá heimaliðnum. Partarnir báðir fingu tó eitt mál afturat í part, men hesi høvdu lítið annað enn kosmetiskan týdning.

**TB-KÍ 4-1 (1-0):**
1-0: Eyðun Svalbard
2-0: Dan Mortensen
3-0: Kai Roest
4-0: Kaj Roest
4-1: Fríðin Ziskason



*Eyðun Svalbard er í ár komin aftur til TB, og hann legði fyri við málskjótingini, tá KÍ varð sent norður við ongum*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

# Eingin umbering



VB-liðskiparin, Eyðun Jacobsen, er vanliga ikki maðurin, sum tekur tey stóru orðini í munnin, men tá vit fregnaðust um misnýttu møguleikarnar sunnudagin, var hann sera avgjørdur.

– Hatta kunnu vit so bara takka okkum sjálvum fyri. Gaman í hevur HB sínar møguleikar fyri steðgin, men tá teir ikki skora upp á hesar, so eiga vit at revsa teir. Kjansirnir, sum vit fáa, eru eisini av tí slagnum, sum bara skulu inn. Hatta var snøgt sagt ikki nóg gott, helt hann um misnýttu møguleikarnar.

Men hóast hetta, so vóru eisini glottar í avrikinum hjá VB. Ikki minst at teir í seinna hálvleiki mentu seg somikið nógv, men júst hvørjar broytingar vórðu gjørdar í steðginum?

– Vit ásannaðu bara, at teir sluppu alt ov lætt á miðjuni. Avtalað varð, at vit allir máttu stríðast fyri úrslitinum, og at vit allir tóku ábyrgd á okkum. Tað gjørdu vit so eisini, og tað haldi eg, at vit kunnu bara vera nøgdir um.

Og tit hava eisini tvær hálvfinalur móti HB fyri framman. Gevur ein dystur sum hesin eisini mót til ta uppgávuna.

– Tað er klárt. Eg haldi í øllum førum, at hatta HB-liðið er til at tosa við, men fyrst og fremst, so mugu vit betra um okkara egna avrik, áðrenn vit tosa alt ov nógv um hini, segði altso Eyðun Jacobsen at enda.

**-jm**

HB-VB 2-1 (1-0):

# Fyrsti HB-sigurin



*Bæði liðini høvdu sínar møguleikar sunnudagin, og ikki minst munnu tey í VB iðra seg um vána nýtsluna av hesum*

**Vágbingar hildu seg hava meira uppiborið, men tað var HB, sum stóð eftir við stigunum í Gundadali**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Triðju ferð innan heilt fáar vikur skuldu vágbingar til Havnar, tá teir hesaferð skuldu leika landskappingardyst móti HB.

Tá liðini hittust í steypakappignini herfyri, gjørdist talan um lemjandi stórtap hjá VB, og hóast málini ikki vóru so nógv, so var tað fyri steðgin lítið, sum bendi á, at VB skuldi gera nakrar serliga skreytir í dystinum sunnudagin.

HB sat snøgt sagt á tí mesta í fyrra hálvleiki, og teir fingu fleiri góðar møguleikar, men tað eydnaðist bert at skora ta einu ferðina, tá Rógvi Jacobsen stútaði bóltin fyri føturnar á Heine Ferndandez, sum smekkaði til.

Hinvegin vóru vágbingarnir ikki heilt vandaleysir í kontra-atsóknunum, og nakrar ferðir mátti Pól N. Joensen veruliga spíla seg út.

### VB trýsti

Eftir steðgin skifti dysturin fullkomuliga ham. Vágbingar løgdu bragdliga fyri, og eftir lítlari løtu høvdu teir fingið javnvág í.

Mindaugas slapp leysur í síðuni, og tá málverjin kom ímóti, rullaði hann flatt yvir til Dan Djurhuus, sum legði bóltin í málið. Heimaliðið royndi at mótmæla, tí teir hildu talan vera um rangstøðu, men dómarin lat tó ikki við seg koma, og so setti VB av álvara ferð á.

Útjavningin tóktist av álvara at geva HB ein hvøkk, og næstu longu løtuna vóru tað gestirnir, sum førdu orðið. Tað eydnaðist teimum eisini at spæla seg fram til nakrar heilt góðar møguleikar, men hvørki Mindaugas, Dan Djurhuus ella Birgir Jørgensen vóru nóg neyvir. HB slapp við skelkinum, og so líðandi komu teir eisini við aftur í dystin.

VB var tó framvegis ikki heilt vandaleyst, men tað var nú kanska HB, sum hevði leikligu yvirvágna.

### Super-sub

Avgerðin fall tó ikki, fyrr enn einir 10 minuttir vóru eftir at leika. Hendrik Rubeksen, sum veruliga tykist gera um seg á HB-liðnum í ár, var júst innskiftur. Hann rak eitt sindur aftur og fram í síðuni, og tá hann so fann Rógva Jacobsen takkaði klaksvíkingurin fyri og stútaði forloysandi málið í kassan.

Hetta gav aftur HB meira róð í spælinum, men vágbingar royndu tó at trýsta. Talan gjørdist tó ikki aftur um teir heilt stóru møguleikarnar, og so er spurningurin, hvørt HB við hesum hevur sett kósina fram móti oddinum, har teir sjálvir halda seg vera sjálvsagdan part av stríðnum.

Komandi hósdag skal HB til Fuglafjarðar, har tað sjáldan er lætt at spæla, og megna teir eisini at fáa trý stig her, fer av álvara at síggja meira hugagott út hjá teimum. Teir mugu tó vera Martin Christensen fyri uttan til hesa uppgerðina, tí sterki danin fekk tvey gul – og harvið reytt – sunnudagin.

VB skal tá royna seg á útivølli móti EB/Streymi í tí, sum líkist einum veruligum botnslagi, áðrenn teir um vikuskiftið aftur skulu til Havnar. Tá eru tað hálvfinalurar í steypakappingini, sum standa á skránni, og so er spurningurin, hvørt vágbingarnir til ta tíð megna at betra um úrtøkuna. Hon var ikki nóg góð sunnudagin, og tað er fremsta orsøkin til, at VB framvegis bert hevur eitt stig eftir fyrstu trý umførini.

**HB-VB 2-1 (1-0):**
1-0: Heine Fernandez
1-1: Dan Djurhuus
2-1: Rógvi Jacobsen

**HB:** Pól N. Joensen – Hallur Danielsen, Vagnur M. Mortensen, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Martin Christensen, Rógvi Jacobsen – Heine Fernandez, Heðin á Lakjuni
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan í Hørg, Anders Sørensen, Eyðun Jacobsen, Dalius – Palli Augustinussen, Jákup F. Olsen, Milan Kulic, Dan Djurhuss – Birgir Jørgensen, Mindaugas
**Dómari:** Birgir Sondum



# FM byrjar hósdagin

**86 svimjarar fara at kappast um gullmerkini, tá FM-kappingin í svimjing verður á skránni**

SVIMJING

*tíðindaskriv*

Føroyameistaraskapið í svimjing verður í Tórshavn hósdagin, fríggjadagin og leygardagin 20, 21 og 22 mai, og verða tað 86 svimjarar við 500 startum ið fara at kappast hesar tríggjar dagar um medaljurnar í teimum 40 kappingunum ið verða.

Innleiðandi kappingarnar verða svomnar fyrrapart og finalir seint seinnapart allar dagarnar

Leygarkvøldið tá FM er liðugt, verður Gallaveitsla Kl. 20:00 á Hotel Føroyum, har ymisk steyp verða handa til: Grand Prix vinnarnar og ársins svimjarar, venjarar, hjálparfólk, heppifelag o.a

Eisini fer landsliðsvenjarin Petur Heðin á Fløtti at taka út átta svimjarar ið skullu luttaka til Íslendska meistaraskapið í 50m hylið, henda kapping verður í Reykjavík í døgunum 11 til 14 juni.

Sum sagt, so byrjar kappingin hósdagin. Longu kl. 9.00 eru fyrstu innleiðandi kappingarnar á skránni, og seinni á degnum verður so almenna setanin av kappingini.

Fyrstu finalurnar eru á skránni beint eftir hetta, og fríggja- og leygardagin verður annars svomið upp á sama hátt. Altso innleiðandi kappingarnar kl. 9 um morgunin, meðan finalurnar so eru á skránni kl. 18.



*Ivaleyst verða nógv, sum fara at fylgja sera væl við, tá FM-kappingin í svmjing verður hildin frá hósdegnum til leygardagin*

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK (M) | 31 | 19 | - | 7 | - | 5 | 51 | 24 | 27 | 64 |
| 2 Brøndby (S) | 31 | 18 | - | 7 | - | 6 | 50 | 27 | 23 | 61 |
| 3 Esbjerg | 31 | 17 | - | 8 | - | 6 | 64 | 39 | 25 | 59 |
| 4 OB | 31 | 15 | - | 8 | - | 8 | 60 | 44 | 16 | 53 |
| 5 AaB | 31 | 15 | - | 8 | - | 8 | 51 | 39 | 12 | 53 |
| 6 FCM | 31 | 13 | - | 6 | - | 12 | 62 | 47 | 15 | 45 |
| 7 Viborg | 31 | 10 | - | 8 | - | 13 | 43 | 42 | 1 | 38 |
| 8 AGF | 31 | 11 | - | 3 | - | 17 | 44 | 62 | -18 | 36 |
| 9 FC Nordsj. | 31 | 7 | - | 10 | - | 14 | 32 | 54 | -22 | 31 |
| 10 Herfølge | 31 | 8 | - | 6 | - | 17 | 33 | 52 | -19 | 30 |
| 11 Frem | 31 | 8 | - | 3 | - | 20 | 36 | 56 | -20 | 27 |
| 12 AB | 31 | 7 | - | 2 | - | 22 | 27 | 67 | -40 | 23 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

**Danska 1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Silkeborg | 25 | 18 | - | 4 | - | 3 | 47 | 17 | 30 | 58 |
| 2 Randers FC | 25 | 17 | - | 3 | - | 5 | 67 | 37 | 30 | 54 |
| 3 AC Horsens | 25 | 16 | - | 5 | - | 4 | 42 | 17 | 25 | 53 |
| 4 Sønderjyske E | 25 | 14 | - | 5 | - | 6 | 63 | 38 | 25 | 47 |
| 5 Køge | 25 | 13 | - | 7 | - | 5 | 46 | 33 | 13 | 46 |
| 6 Skjold | 25 | 12 | - | 4 | - | 9 | 52 | 45 | 7 | 40 |
| 7 Ølstykke | 25 | 12 | - | 3 | - | 10 | 54 | 44 | 10 | 39 |
| 8 Nykøbing | 25 | 12 | - | 3 | - | 10 | 41 | 40 | 1 | 39 |
| 9 FC Nordjylland | 25 | 8 | - | 7 | - | 10 | 29 | 38 | -9 | 31 |
| 10 Fredericia | 25 | 7 | - | 9 | - | 9 | 33 | 37 | -4 | 30 |
| 11 Fremad Amager | 25 | 7 | - | 6 | - | 12 | 34 | 44 | -10 | 27 |
| 12 Brønshøj | 25 | 6 | - | 6 | - | 13 | 35 | 58 | -23 | 24 |
| 13 B 93 | 25 | 5 | - | 7 | - | 13 | 33 | 45 | -12 | 22 |
| 14 Vejle | 25 | 5 | - | 6 | - | 14 | 32 | 49 | -17 | 21 |
| 15 FC Aarhus | 25 | 5 | - | 3 | - | 17 | 25 | 58 | -33 | 18 |
| 16 B 1913 | 25 | 1 | - | 6 | - | 18 | 17 | 58 | -41 | 9 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dalum | 25 | 16 | - | 5 | - | 4 | 61 | 31 | 30 | 53 |
| 2 Næstved | 25 | 13 | - | 7 | - | 5 | 53 | 26 | 27 | 46 |
| 3 HIK | 25 | 13 | - | 7 | - | 5 | 52 | 37 | 15 | 46 |
| 4 Holbæk | 25 | 12 | - | 7 | - | 6 | 54 | 37 | 17 | 43 |
| 5 Kolding FC | 25 | 11 | - | 7 | - | 7 | 44 | 38 | 6 | 40 |
| 6 B1909 | 25 | 11 | - | 4 | - | 10 | 48 | 40 | 8 | 37 |
| 7 Brabrand | 24 | 9 | - | 6 | - | 9 | 46 | 37 | 9 | 33 |
| 8 Slagelse | 23 | 9 | - | 5 | - | 9 | 40 | 35 | 5 | 32 |
| 9 Glostrup | 25 | 9 | - | 4 | - | 12 | 45 | 49 | -4 | 31 |
| 10 Hjørring | 25 | 9 | - | 3 | - | 13 | 36 | 66 | -30 | 30 |
| 11 Jetsmark | 24 | 7 | - | 7 | - | 10 | 33 | 50 | -17 | 28 |
| 12 Skive | 25 | 8 | - | 3 | - | 14 | 44 | 51 | -7 | 27 |
| 13 Lyngby | 25 | 6 | - | 9 | - | 10 | 39 | 55 | -16 | 27 |
| 14 Kalundborg | 25 | 6 | - | 8 | - | 11 | 51 | 57 | -6 | 26 |
| 15 Hvidovre | 25 | 5 | - | 9 | - | 11 | 29 | 49 | -20 | 24 |
| 16 Holstebro | 25 | 6 | - | 5 | - | 14 | 40 | 57 | -17 | 23 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

**Íslendska Landsbankadeildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fram | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 2 Keflavík | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 3 FH | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 4 ÍA | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 5 Fylkir | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 ÍBV | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 Grindavík | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 8 KA | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 9 KR | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 10 Víkingur R | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!